## ALV-stýrið vil einki siga

Hóast ónøgdsemi og ákærur frá bæði Øssuri av Steinum sjálvum og næmingum á ALV-skúlanum vil ALV-stýrið ongar viðmerkingar gera til málið um umstríddu uppsøgnina av skúlastjóranum Við Áir. - Sum vit áður hava víst á er hetta eitt persónsmál, og vit vilja ikki fara út í fjølmiðlarnar við viðmerkingum um eitt persónsmál, sigur Doris Hansen, forkvinna í nevndini í ALV.

## ALV-stýrið átti at verðið skift út

**– Sambært lógini skal ALV-stýrið skiftast út eftir fýra árum, og núverandi stýrið hevur sitið síðani 1. januar 2000. Tí er tað sera løgið og harmiligt, at stýrið í síni egnu yvirtíð tekur eina so drastiska avgerð og sigur skúlastjóran Við Áir upp, sigur Jóannes Eli Iversen, fakfelagsformaður hjá Øssuri av Steinum**

UPPSØGN
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Uppsøgnin av skúlastjóranum á ALV-skúlanum Við Áir hevur vakt miklan ans. Doris Hansen, forkvinna í ALV-stýrinum, vil ongar viðmerkingar gera til uppsøgnina av Øssuri av Steinum í fjølmiðlunum, tí talan er um eitt persónsmál, og nú hevur fakfelagið hjá Øssuri av Steinum, Føroya Lærarafelag, kært framferðarháttin hjá stýrinum til avvarðandi landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum, Hans Paula Strøm.

Formaðurin í Føroya Lærarafelagi, Jóannes Eli Iversen, sigur, at við kæruni hevur fakfelagið gjørt tað, sum stendur í teirra makt at ávirka støðuna, og sambært Dimmalætting fer Hans Pauli Strøm at viðgerða málið í komandi viku.

### Stýrið sitið ov leingi

Fakfelagsformaðurin hjá Øssuri av Steinum sigur seg harmast um viðferðina, Øssur hevur fingið frá stýrinum.

– Skúlastjórin Við Áir hevur gjørt eitt pionerarbeiði á ALV-skúlanum og verið har í mong harrans ár. Tí er tað løgið og harmiligt, at hann fær slíka viðgerð frá stýrinum, sigur Jóannes Eli Iversen. Men fakfelagsformaðurin hevur eisini aðrar ákærur móti ALV-stýrinum.

– Sambært lógini skal ALV-stýrið skiftast út eftir fýra árum, og núverandi stýrið hevur sitið síðani 1. januar 2000. Tí er tað sera løgið og harmiligt, at stýrið sigur skúlastjóran upp í síni egnu yvirtíð, sigur Jóannes Eli Iversen.

Stýrið skuldi sambært honum sostatt verið skift út, og við hesum í huga er drastiska avgerð teirra sera undranarverd. Jóannes Eli væntar, at nývalið í januar mánaði er ein orsøk til, at stýrið ikki er skift út.

– Samanumtikið bakka vit Øssur av Steinum upp í hesum máli, og nú hava vit so kært uppsøgnina til landsstýrismannin, sigur Jóannes Eli Iversen, formaður í Føroya Lærarafelagi.

# Listin í hásætið á Varmakeldu

**Ongin ivi er um, at fuglfirðingar hava valt mentan og list sum vørumerki fyri Varmakeldustevnuna í ár. Umframt stórsligna samtakið »Menniskja í Søgu og søgn«, fáa stevnugestirnir eina ørgrynnu av øðrum listarligum upplivingum at velja ímillum á Varmakeldu, sum verður í døgunum 1.- 4. juli**



VARMAKELDA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Listarligu tiltøkini á Varmakeldu byrja longu mikukvøldið 30. juni kl. 20.00. Eftir at Jógvan á Lakjuni hevur sett Varmakelduframsýningina í Mentanarhúsininum, verða tveir fyrilestrar um list á skránni. Bárður Jákupsson fer at tosa um føroyska list, og Petur Martin Petersen og Brynhild Petersen fara at halda fyrilestur um ávikavist lívið og listina hjá listamanninum Jóanesi Kristiansen.

Hósdagin 1. juli lata síðani ein røð av ymsum framsýningum upp, har høvi verður at síggja og hoyra verk hjá bæði føroyskum og útlendskum, kendum og minni kendum listafólkum

### »Vanvart«

Í Riberhúsi hevur leirlistakonan Gurðið Poulsen eina forvitnisliga stakframsýning, sum hon nevnir "Vanvart". Heitið sipar til tilfarið, tann brenda steintoysleirin, sum bæði er ótrúliga sterkur og óbroytiligur, men samstundis skroypiligur og lætt støkkur sundur. Í summum verkum hevur listakvinnan toygt leirin so langt, at hann er á markinum, har hann ikki "kann ella vil" meira. Men heitið "Vanvart" er eisini ein tilsiping til menniskjalyndið, sum á ein gátuføran hátt kann tykjast so óvikaligt og sterkt, men samstundis er so veikt og viðbrekið.

Øll verkini á hesi framsýningini hjá Gurðið Poulsen eru nýggj.

### Út úr kjallaranum

Í fimleikarahøllini letur afturvendandi Varmakelduframsýningin upp, og hevur hon hesuferð fingið heitið "Blandað list". Hóast framsýningin ongantíð hevur havt nakra skipaða nevnd, og kom í lag í síni tíð mest fyri at lokka listafólk "út úr kjallararnum", sum ein av fyrireikarnum tekur til, so hevur hon yvirlivað og kann í ár hátíðarhalda sín 35 ára føðingardag.

Kanska hetta eisini hevur givið øðrum listafólkum hug og dirvi at kaga út úr kjallaranum. Í Gomlu Toystovuni lata tey ungu dyrnar upp til framsýningina "Ung List", har flestu listafólkini eru undir 30 ár. Frá fyrireikarnum frætta vit, at tey ungu hava sýnt hesi framsýningini ógvuliga stóran áhuga. Okkurt bendir á, at ung listafólk tora betur at bjóða seg fram, tá tey vita, at øll hini á framsýningin eisini eru lutfallsliga nýggj í listayrkinum, halda fyrireikarnir.

Tey menningartarnaðu smæðast heldur ikki burtur. Hesuferð eru tað tey á Verkhúsinum Stíggur, sum saman við Ogga Lamhauge, pedagogi og grafikara, sýna fram myndir og lutir. Framsýningin "Menningartarna saman við Ogga" verður at síggja í Stórhúshøll.

### Útlendsk luttøka

Tað vera tó ikki bara føroyskar listaframsýningar at síggja á Varmakeldu í ár. Í Arbeiðsmannafelagshúsinum fer danski listabólkurin 7:9:13 at sýna fram. Hetta eru somu listafólkini, sum hava gjørt standmyndirnar, sum í løtuni verða settar upp á ytra armi í bátahylinum í Fuglafirði.

Sum nakað rættiliga øðrvísi verður Kommunuhúskjallarin hesar dagarnar karmur um eina ljóðmynd. Tað er íslendski ljóðlistamaðurin Baldvin Ringsted, sum við fløguspælarum og 16 hátalarum fer at skapa eina ljóðuppseting, sum skal ímynda samskiftið millum norðurlendskan og amerikanskan tíðaranda.

### Kort yvir listina

Av tí at so nógvar framsýningar hava opið samstundis, eru nærum øll hóskandi høli í bygdini tikin í nýtslu. Hesi liggja rættiliga spjødd, og tí er ætlanin, at tey vitjandi bert skulu nýtast at keypa eitt atgongumerki, sum so er galdandi til allar framsýningarnar. Saman við atgongumerkinum, sum verður keypt í fimleikarahøllini, fáa fólk eisini útflýggjað eitt lítið kort yvir, hvar í bygdini hinar framsýningarnar eru. Eisini verða gøturnar í bygdini merktar við littum pílum, so ongin trupulleiki skuldi verðið at finna tað, tú leitar eftir.






